


Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Skáli er á veg aftur í næstbesta deildina

*3. deild: Argjamenn taptu lykladystin á heimavølli, meðan Skáli ikki hevur tapt síðani 7. mai, tá AB vitjaði á Skála*



*Sunnudagin lyfti KÍ seg upp um ÍF á stigatalvuni*
***Mynd: SJH***

Nógv bendir á, at tað verður Skáli, sum fer at vinna 3. deild og harvið fer at flyta beinleiðis upp í næstbestu deildina. Skáli er eftir 13. umfarið fyri fyrstu ferð á árinum komin upp á fremsta plássið. Um úrslitini higartil verða brúkt sum grundarlag fyri vánirnar tað, sum er eftir av kappingini, so er møguleikin hjá skálamonnum fyri góðari úrtøku minst líka góður, sum hann er hjá AB. Argjamenn eru teir einastu, sum kappast við Skála um beinleiðis uppflytingina.

Um Skáli skal missa okkurt stigið fimm tey seinastu umførini, so er mest sannlíkt, at teir kunnu gera tað í næstseinasta umfarinum. Tá skulu teir spæla í Gundadali móti B36. Onkuntíð hevur B36 gott lið, og onkuntíð er tað minni gott.

Men sjálvt um Skáli møguliga verður fyri stigatapið í Gundadali, so kunnu teir alíkavæl vinna beinleiðis uppflytingina. Kappingarneytarnir úr AB hava ikki verið so støðugir síðani undan summarsteðginum. Vit nevndu undan summarfrítíðini, at teir taptu á heimavølli móti B71. Síðani hava teir vunnið 5–4 í Klaksvík, og sjálvt um teir smurdu eitt illa mannað vágalið av 11–0, so ber 5–3 tapið á heimavølli móti Skála við sær, at tað í fyrstu atløgu verður torført at røkka málinum, sum er at spæla í næstbestu deildini komandi ár. AB fær í síðsta umfarinum vitjan av B36, og tað verður ivaleysa torført.

Tíðliga í kappingarárinum bendi einki á, at Skáli, sum flutti niður úr 2. deild í fjør, skuldi vera við í kappingini um fremsta plássið. Teir taptu tríggjar teir fyrstu dystirnar. Eftir vitjanina í Klaksvík, har teir vóru óhepnir at dystast við teir næstbestu í KÍ, og eftir at teir høvdu verið í Vágum og høvdu havt vitjan av AB, var stigapjøkin púra tómur, og málmunurin var 2–11. Síðani hevur tað gingið sum eftir ánni hjá skálamonnum. Burtursæð frá málleysa javnleikinum á Svangaskarði í 6. umfarinum hava teir fingið fult hvørja ferð.

At tað tók rúma tíð hjá skálamonnum at koma fyri seg í komst m.a. av, at fleiri vóru upptiknir av hondbóltinum. Nú er í flestu støðum sjøtul settur á fyrireikingarnar til nýggja hondbóltsárið. Tí er møguleikin ikki óhugsandi, at tað fer at ávirka fólkafrundarlagið undir oddaliðnum, og spurningurin hevur onkuntíð verið frammi, um teir á Skála eru serliga áhugaðir í at spæla í næstbestu fótbóltsdeildini. Í hvussu so er kunnu vit siga, at teir fyribils hava spælt seg til ovasta plássið, og so fáa vit at síggja, um teir megna at halda stílin, sjálvt um hondbólturin aftur verður settur fremst hjá fleiri á vestara arminum á Skálafjørðinum.

### ÍF illa spert

Í botninum eru tað serliga fuglfirðingar, sum eru illa fyri. Síðsta sunnudag vóru teir í Klaksvík og spældu um at sleppa av aftasta plássinum. KÍ hevði fleiri av eykamonnunum í 1. deild, sum ikki vóru komnir inn ímóti GÍ, á liðnum, og í 2. hálvleiki kom hetta væl til sjóndar.

ÍF hevur altíð í níti árunum ligið fram ímóti heiðursmerkjum, men nú sær ikki væl út. KÍ, sum í Vági tapti 12–0 (Per Joensen, sum hevur verið í Íslandi, var við á VB liðnum og skoraði átta mál), hevur sett hjálparvenjaran hjá Tomislav Sivic, Bill Jacobsen, at hava ábyrgdina av 3. deildarliðnum. Nú manna teir liðið við eykamonnum í 1. og 2. deild og so onkrum unglingum afturat.

Næstbesta liðið hjá B68 hevur ferðast nógv ímillum 2. og 3. deild. Í ár hevur ligið illa fyri. Teir fingu trý stig, tá TB ikki møtti á Svangaskarði. Tvørámenn søgdu seg ikki vera førar fyri at manna lið, tí ein studentaskúlaflokkur var í Portugal.

Vágamenn eru ikki heilt leysir úr botninum, men tað skal ganga illa, um teir skulu flyta niður. Manningin hevur ikki verið nakað serlig. Albert Ellefsen spældi við, tá teir vunnu 6–3 ímóti oddaliðnum úr B36.

JH

### Úrslit

### 11. umfar – 6. august

**Skáli – FS Vágar 6–0 (4–0)**
1–0: sjálvmál 19.
2–0: Anfinnur Joensen 24.
3–0: Pauli Hansen 41.
4–0: Kaysten Rasmussen 44.
5–0: Hans Kristian Djurhuus 64.
6–0: Hans Kristian Djurhuus 89.

**B36–B68 4–0 (2–0)**
1–0: Regin Arge 13.
2–0: Allan Manai br 27.
3–0: Jóannes Guttesen 46.
4–0: Petur M. Johansen 87.

**TB–ÍF 2–1 (1–0)**
1–0: Sten Sørensen 43.
2–0: André Dalfoss 55.
2–1: Henry Petersen 75.
Reytt kort: Fróði Poulsen, ÍF

**B71–VB 5–0 (2–0)**
1–0: Kristoffur Vidtfeldt 27.
2–0: Eirikur Poulsen 36.
3–0: Kristoffur Vidtfeldt 69.
4–0: Antines Magnussen 78.
5–0: Bjørn Thorsteinsson 89.

**KÍ–AB 4–5 (3–1)**
0–1: sjálvmál 8.
1–1: Bárður Andreasen 9.
2–1: Bárður Andreasen 26.
3–1: Leon Bjartalíð 39.
4–1: Leon Bjartalíð 51.
4–2: Benny Poulsen 67.
4–3: Svend Poulsen 72.
4–4: Svend Poulsen 82.
4–5: Svend Poulsen 85.
Reytt kort: Atli Jacobsen, KÍ, 45.

### 12. umfar – 13. august

**FS Vágar–B36 6–3 (1–2)**
0–1: Regin Arge 15.
0–2: Kári Johansen 28.
1–2: Georg Haraldsen 30.
2–2: Jóhan Nielsen 54.
3–2: Petur Niclassen 55.
4–2: Georg Haraldsen 65.
5–2: Magnus Simonsen 74.
5–3: Regin Arge 82.
6–3: Petur Niclassen 90.

**B68–TB**
B68 uttan dyst

**ÍF–B71 7–2 (2–1)**
0–1: Eirikur Poulsen 14.
1–1: Jákup Baldvinsson 19.
2–1: Jógvan Anfinn Jacobsen 44.
3–1: Jógvan Anfinn Jacobsen 46.
4–1: Høgni Zachariasen 50.
5–1: Jákup Baldvinsson 53.
5–2: Kristoffur Vidtfeldt 80.
6–2: Janus Petersen 85.
7–2: Jógvan Anfinn Jacobsen 88.

**VB–KÍ 11–0 (7–0)**
1–0: Per Joensen 4.
2–0: Per Joensen 7.
3–0: Per Joensen 15.
4–0: Per Joensen 22.
5–0: Hans Allan Niclassen 24.
6–0: Per Joensen 35.
7–0: Per Joensen 45.
8–0: Per Joensen 46.
9–0: Sølvi Joensen 47.
10–0: Hans Jákup Hjelm 63.
11–0: Per Joensen 81.

**AB–Skáli 3–5 (1–4)**
1–0: Magnus Hentze 9.
1–1: Ólavur Olsen 11.
1–2: Hans Kristian Djurhuus 28.
1–3: Hans Kristian Djurhuus 34.
1–4: Marius Joensen 37.
1–5: Pauli Hansen 53.
2–5: Svend Poulsen 61.
3–5: Sigurd Vatnhamar 90.

### 13. umfar – 20. august

**AB–FS Vágar 11–0 (2–0)**
1–0: Svend Poulsen 8.
2–0: Magnus Hentze 20.
3–0: Svend Poulsen 50.
4–0: Svend Poulsen 55.
5–0: Fróði Stenberg 63.
6–0: Magnus Hentze 67.
7–0: Hallur Petersen 77.
8–0: Svend Poulsen 78.
9–0: Svend Poulsen 83.
10–0: Svend Poulsen 86.
11–0: Svend Poulsen 90.

Reytt kort: Jóhan Nielsen, FSV, 45.

**B71–B68 4–3 (3–1)**
1–0: Páll á Reynatúgvu 10.
2–0: sjálvmál 17.
2–1: Aksel Højgaard 40.
3–1: Kristoffur Vidtfeldt 44.
4–1: Páll á Reynatúgvu 49.
4–2: Aksel Højgaard 52.
4–3: Aksel Højgaard 65.
Reytt kort: Hansmar Poulsen, B68, 55.

**TB–B36 3–2 (2–0)**
1–0: Jóhannes Johannesen 14.
2–0: Lynge Nielsen 23.
3–0: Jóhannes Johannesen 56.
3–1: Hans Jacob Heinesen br 70.
3–2: Allan Manai 75.

**KÍ–ÍF 5–2 (0–0)**
1–0: Aksel Johannesen 48.
2–0: Helmar Lassen 58.
2–1: John Thomsen 66.
3–1: Hjalgrím Elttør 69.
4–1: Símun Joensen 83.
5–1: Helmar Lassen 84.
5–2: Hergeir Eldevig 86.

**Skáli–VB 3–2 (2–1)**
1–0: Pauli Hansen 16.
1–1: Sølvi Joensen 25.
2–1: Marius Joensen 26.
2–2: Hans Jákup Hjelm 53.
3–2: Marius Joensen 79.

Reytt kort: Arnhold Berg, Skáli, 90.



**Máltindurin**
**3. deild:**

| | | |
|---|---|---|
| Svend Poulsen | AB | 17 |
| Kristoffur Vidtfeldt | B71 | 15 |
| Pauli Hansen | Skála | 12 |
| Signar Johannesen | AB | 11 |
| Aksel Højgaard | B68 | 11 |
| Petur Niclasen | FS Vágar | 10 |
| Oddbjørn Joensen | AB | 9 |
| Egill Steintórsson | VB | 9 |
| Regin Arge | B36 | 8 |
| Kaj Roest | TB | 8 |
| Per Joensen | VB | 8 |
| Hans C. Djurhuus | Skála | 7 |
| Jákup Olsen | B68 | 6 |
| Marius Joensen | Skála | 6 |
| Kári í Lágabø | VB | 6 |
| Páll á Reynatúgvu | B71 | 5 |
| Magnus Simonsen | FS Vágar | 5 |
| Jákup Baldvinsson | ÍF | 5 |
| Jógvan A. Jacobsen | ÍF | 5 |
| Aksel Johannesen | KÍ | 5 |
| Kaysten Rasmussen | Skála | 5 |
| Eyðun Svalbard | TB | 5 |
| Hallur Christiansen | TB | 5 |
| Fróði Stenberg | AB | 4 |
| Dánial Petur Johansen | B36 | 4 |
| Tumas Eli Hansen | B36 | 4 |
| Eirikur Poulsen | B71 | 4 |
| Jónsvein Thomsen | B71 | 4 |
| Sjálvmál | B71 | 4 |
| Bárður Andreasen | KÍ | 4 |
| Leon Bjartalíð | KÍ | 4 |
| Jón Rasmussen | Skála | 4 |
| Jóhannes Johannesen | TB | 4 |
| Just Johannesen | TB | 4 |

# Leiftur kærkomið stig

*Ísland: Men enn er langt á mál hjá Pálli Guðlaugsson, sum nú aftur er á beinkinum á Ólafsfirði*

Meistararnir og steypavinnararnir frá í fjør, KR, vóru mikukvøldið á Ólafsfirði, har útsetti dysturin frá 13. umfari var á skránni. Hann var útsettur, tí KR spældi í undankappingini til europeisku meistarakappingina. Mótstøðuliðið var Brøndby. Hjá báðum liðunum ráddi mikukvøldið um at vinna. KR hevði fyri neyðini at fáa øll stigini, um teir skuldu hugsa um at varðveita møguleikan fyri at endurvinna meistaraskapin, og Leiftur hevði harðliga brúk fyri øllum stigunum, um teir skulu lyfta sær av aftasta plássinum.

Bæði liðini fóru av vøllinum í einki serliga góðum hýri. Úrslitið var málleysur javnleikur. Heimaliðið legði bragdæliga fyri. Teir vóru leikliga omaná í 1. hálvleiki, og teir høvdu onkran góðan málmøguleika eftir hornasparksstøðu, men teir fingu einki mál. Seks minuttir undan leikloki stóð brasiliumaðurin Santos leysur í málteiginum, men skotið fór omanfyri málið. Í 2. hálvleiki vóru gestirnir fleiri ferðir vandamiklir í skjótum mótálopum, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa bóltin framvið Jens Martini Knudsen.

Allir føroyingarnir vóru á vøllinum alla tíðina. Jens Martin Knudsen fekk longu í 3. minutti gult kort, tá hann sambært Morgunblaðnum feldi ein mótstøðumann.

Í vikuskiftinum skal Leiftur spæla ímóti Stjarnuni, sum er næstniðast. Leiftur hevur tíggju stig, og Stjarnan hevur 13 stig. Páll Guðlaugsson er nú á beinkinum hjá Leiftri. Hann og allir hinir á Ólafsfirði vita, at um hugsningur skal vera um at sleppa upp á triðji aftasta plássið, sum ber framhaldandi rætt til bestu deildina við sær, so mugu trý stig fáaast burturúr ímóti Stjarnuni.

Fram er triðji aftast. Teir hava sekstan stig. Tað eru fimm umfør eftir av Landssimadeildini. Komandi vikuskifti eru bæði John Petersen og Sámal Joensen leikbannaðir, so tað er einki serligt hjá Leiftri.

JH

# Herfølge málleyst

*Avgreiðsludysturin í Glasgow var úrslitaliga ein endurtøka av tí í Herfølge*

Jákup Mikkelsen vardi málið, tá Herfølge mikukvøldið royndi at betra um samlaðu myndina av luttøkuni í Europa Cup fyri meistaralið. 36.141 áskoðarar vóru á Ibrox í Glasgow. Tað er størsta áskoðaratalið, sum Herfølge nakrantíð hevur spælt fyri, og Jákup Mikkelsen hevur heldur ikki á landsliðnum havt so nógvar áskoðarar rundanum seg.

Í fyrra dystinum var tað ein stórur trupulleiki, at Herfølge spælararnir tóktust stívir og tungir. Soleiðis var tað ikki hesa ferð. Herfølge spældi av lívsins kreftum frá fyrsta bríksli. Tað verður sagt, at talan var um nógvar nærdystir. Dómarin var í so lagaligur, og tí stóðust nógvar harðligar støður burturúr. Í 2. hálvleiki varð Jörg Albertz, týski miðvallarin sum í fyrra dystinum gjørdi eitt frágera gott mál upp á langskot, borin av vøllinum. Hann hevði fingið ein løst í knæi, og í gjár bóru teir ótta fyri, at talan var um skaða, sum fór at halda honum burtur frá vøllinum í langa tíð.

Øll málini komu eftir steðgin. Í 48. minutti skoraði Rod Wallace eftir flatt innlegg, í 78. minutti stútaði Allan Johnsson í kassan eftir hornaspark, og í evstu løtu var tað Andrey Kanchelskis, sum staðfesti 3–0 sigurin. Hann var komin inn um verjuna, og tá Jákup Mikkelsen kendi seg noyddan at leypa út, var fyrrverandi Manchester United maðurin kaldur og lyfti upp um málverjan.

Herfølge fær ein nýggjan møguleika í Europa Cup. Í dag verður lutur kastaður um, hvussu liðini í UEFA kappingini skulu hittast. Tá verður Herfølge í trumluni, og so mugu vit bara vóna, at altjóða luttøkan ikki fer at órógva Herfølge, sum hon higatil tykist hava gjørt. Sunnudagin skal Herfølge spæla landskappingardyst á heimavølli ímóti AGF.

JH

# FCK fer djúpt í lumman

*Umframt málverja og álopsspælara hava teir nú keypt ein verjuspælara. Talan er um fyrrverandi danska landsliðsspælaran Jacob Laursen*

Hesa síðstu vikuna hevur FCK keypt tveir spælara, og í gjár fóru teir aftur djúpt í lumman. Fyrsti keyptu teir Pascal Simpson at styrkja um álopið, so keyptu teir Pat Onstad, sum er málverji, og í gjár fóru teir aftur í lumman. Hesa ferð keypa teir ein verjuspælara.

Jacob Laursen var inntil fyri einum góðum ári síðani fastur fúsur í danska landsliðshópinum. Hann var ikki nógv avhildin av áskoðarunum og donsku pressuni, og at enda gjørdi hann av at taka seg aftur sum landsliðsspælara. Hann hevur kortini framvegis spælt í Derby. Har var hann liðformaður síðsta kappingarár, men nú er hann heilt úti í kuldanum.

Fyrrverandi Vejle og Silkeborg spælarin hevur havt persónligar trupulleikar at dragast við. Konan og børnini eru farin til Danmarkar. Tí hevur Jacob Laursen boðað leiðsluni í Derby frá, at hann ynskir at spæla fótbólt á einum staði, har hann er nærri børnunum.

At FCK hevur keypt tríggjar spælarar kemur ikki púra óvart á. Tá Roy Hodgson gjørdist venjari, segði hann, at tað fór at verða neyðugt at styrkja um hópin. Úrslitini higartil í hesum kappingarárinum hava víst, at tað er alneyðugt.

Sunnudagin fær FCK vitjan í Parkini av Brøndby. Tað verður roknað við, at allir teir tríggir nýggju menninir vera við í hópinum. Nýggju spælararnir tykjast ikki vera nøkur hóttan móti plássinum hjá Toda Jónsson sum álopskendur miðvallari í vinstra borði.

JH

# Fimleikur á Oyggjaleikunum

*Altjóða Oyggjaleikanevndin hevur nú gjørt av, at fimleikur kortini verður á skránni komandi oyggjaleikirnar*

Hesum hevur Oyggjaleikanevndin nú boðað frá í tíðindaskrivi

Tað varð annars avgjørt á aðalfundi hjá altjóða Oyggjaleikanevndini á Gotlandi í fjør, at Oyggjaleikirnir 2003 skulu vera á Guernsey. Samstundis kunngjørdu fyrireikararnir á Guernsey, hvørjar 14 ítróttagreinir verða á teimum leikunum. Hesar greinir vóru: Bogaskjóting, frælsur ítróttur, badminton, kurvabóltur, súkkling, fótbóltur, golf, sigling, skjóting, svimjing, borðtennis, tennis, triatlon og flogbóltur.

Áland, Føroyar og onnur umboð við mótmæltu beinan vegin at fimleikur (sum eisini var millum tær ítróttagreinirnar, upprunaliga valið var ímillum) ikki var við í skránni. Umboðini frá Guernsey gjørdu tó greitt, at fimleikur ikki fór at verða á leikunum, m.a. tí at hendan ítróttagreinin var sera illa skipa á oynni.

Frá fleiri síðum varð enn eina ferð gjørt greitt, at sterk ynski vóru um at fáa fimleik við á skránna, og tá lógirnar fyri IGA á sama fundi vóru broyttar soleiðis, at vertsoyggin kundi seta eina 15. ítróttagrein á skránna, varð staðiliga biðið um at hendan bleiv fimleikur, men gjørt varð greitt frá Guernsey, at teir fóru at velja eina ítróttagrein, men ongir møguleikar vóru fyri at hetta fór at vera fimleikur.

Heimkomin skrivaði Oyggjaleikanevndin bræv til fyrireikararnar á Guernsey um at Føroyar framvegis høvdu ta støðu, at fimleikur skuldi gerast 15. ítróttagreinin á leikunum 2003.

Onki positivt svar kom tá, men á aðalfundi í altjóða Oyggjaleikanevndini á Isle of Man síðst í juli varð kunngjørt, at fyrireikararnir á Guernsey nú høvdu broytt meining, og høvdu avgjørt at seta fimleik á skránna sum ítróttagrein nr. 15 á leikunum um mánaðarskiftið juni/juli 2003.

**Støðan, 3. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 13 | 9 | - | 1 | - | 3 | 52 | 26 | 26 | 28 |
| 2 | AB | 13 | 9 | - | 0 | - | 4 | 65 | 31 | 34 | 27 |
| 3 | B36 | 13 | 9 | - | 0 | - | 4 | 40 | 17 | 23 | 27 |
| 4 | B71 | 13 | 7 | - | 0 | - | 6 | 47 | 38 | 9 | 21 |
| 5 | VB | 13 | 7 | - | 0 | - | 6 | 38 | 39 | -1 | 21 |
| 6 | TB | 13 | 5 | - | 2 | - | 6 | 39 | 37 | 2 | 17 |
| 7 | B68 | 13 | 4 | - | 3 | - | 6 | 34 | 34 | 0 | 15 |
| 8 | FS V | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 34 | 50 | -16 | 14 |
| 9 | KÍ | 13 | 4 | - | 0 | - | 9 | 34 | 94 | -60 | 12 |
| 10 | ÍF | 13 | 3 | - | 0 | - | 10 | 31 | 48 | -17 | 9 |